DAGSINS MEINING

Populistiskt flopp!

Politikkarar brúka nógv ymisk hjálpartól at halda seg flótandi. Serliga tá eitt val nærkast. Men at politikkarar eisini kunnu skapa sær fjølmiðlatekki eftir eitt val, sóu vit eitt dømi um í Degi og Viku mikukvøldið.

Hetta kvøldið avdúkaði vágatingmaðurin, Marjus Dam, seg sum ein stóran populist. Samstundis sum hin vágatingmaðurin, Jóanis Nielsen, vísti seg sum ein seriøsan politikkara, sum ikki letur sær lynda eitt bíligt veljaratekki.

Um sambandsmaðurin ikki nú skjýtur upp, at tað skal vera ókeypis at koyra gjøgnum Vágatunnilin, tá hann letur upp um ársskiftið!!! Tað hevði verið í lagi, um tað ongatíð hevði verið upp á tal at gjalda fyri at koyra gjøgnum fyrsta undirsjóvartunnilin her á landi.

Men sum fólkafloksmaðurin so greidliga vísti á, so var tað ein fyritreyt fyri at fremja verkætlanina, at íløgan skuldi figgjast við brúkaragjaldi, eins og gjørt verður á sjóleiðunum hjá Strandfaraskipum Landsins.

Sjálvandi kunnu vit altíð seta spurnartekin við, sum ein vágamaður gjørdi, hví ikki krevja gjald fyri at koyra á ávísum vegastrekkjum ella koyra um brúnna við Streymin, men hesir vegir ella henda brúgv eru ikki gjørd við teirri fyritreyt, at »bummpengar« skuldu krevjast.

Tað kunnu eisini liggja aðrar orsøkir aftan fyri tað at taka pening fyri at fara gjøgnum ein tunnil ella eftir eini brúgv. T.d. kann eitt endamál vera at avmarka óneyðuga ferðslu. Kanska koyrigina hjá teimum ungu - rukkukoyringina - sum jú hevur nógvar óhugnaligar avleiðingar.

Venda vit aftur til tilmælið hjá Marjusi Dam at koyra ókeypis ella gjalda 20 krónur fyri at sleppa at koyra undir Vestmannasundi, og siga, at tað var ein meiriluti fyri hesum, so eiga vit at taka allan spurningin um ferðing og ferðagjald upp.

– Hvat høvdu tey, sum dagliga skulu sigla um Leirvíksfjørð, Skopunarfjørð ella Suðuroyarfjørð, sagt, um tað var ókeypis at fara um Vestmannasund, tá tað alla tíðina hevur ligið í kortinum, at tað skuldi kosta at sleppa úr og í Vágar eftir at undirsjóvartunnilin loysir Ternuna og Sam av?

Tað hevði verið kollvelting!

Afturímóti hevði tað verið meiri seriøst, um Marius Dam ella onkur annar politikkari tók spurningin um brúkaragjald upp til umroðu. – Áttu vit t.d. ikki at lívgað um útoyggjar ella útjaðara við at lækka munandi um ferðagjøldini og ístaðin játtað Strandfaraskipum Landsins á figgarlógini?, kunnu vit spyrja. Men hetta uppskotið um ókeypis koyring ella at gjalda 20 kr. fyri túrin er einki annað enn eitt populistiskt flopp!

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Avlop landskassans fyri 2002 verður væntandi 100-150 milliónir krónur

Karsten Hansen
landsstýrismaður

Næstformaður sambandsfloksins, Alfred Olsen, roknar seg í Dimmalætting í gjár fram til, at úrslit landskassans fyri 2002 verður eitt undirskot uppá millum 300 og 400 mió. krónur. Hetta er ein áhugaverd útrokning, men hon er tíbetur púrasta skeiv. Nýggjasta metingin hjá Fíggjarmálaráðnum vísur, at úrslit landskassans verður eitt stað millum 100 og 150 millónir krónur - í avlopi. Tað vil siga, at Alfred Olsen skjýtur 450 mió. ella nærum eina hálva milliard krónur við síðuna av.

Alfred Olsen hevur inni á tí frálíka hentu heimasíðuni hjá Føroya Gjaldsstovu funnið fram nøkur tøl, ið hann við vanligari húsmansrokning faldar við tvey - tí at tølini higartil eru fyri fyrra hálvár. Einfalda niðurstøðu næstformansins er síðani, at landskassin í 2002 fer at hava 300-400 milliónir krónur í halli.

Hesin hátturin at framrokna uppá er sum so ikki skeivur, men hædd eigur tá at verða tikin fyri, at inntøkur og útreiðslur ikki falla javnt yvir alt árið. Hetta vita til dømis allir virkis- og roknskaparleiðarar og øll, sum fáast eitt sindur við roknskap. Fíggjarmálaráðið og eg sjálvur taka sjálvsagt eisini hædd fyri hesum viðurskiftum í okkara metingum, eins og vit eisini taka hædd fyri møguligum broytingum í útreiðslum og inntøkum.

Sum dømi uppá útreiðslur, ið falla fyrra hálvár, kunnu nevnast renturnar uppá statslánið uppá útivið 200 milliónir krónir og fyrsta gjaldið til nýggja Smyril uppá 89 milliónir krónur.

Dømi uppá inntøkur, ið falla seinna hálvár, eru partafelagsskatturin og rentuskatturin.

Nógv hevur eisini verið tosað um landskassans innistandandi í Landsbankanum, og einaferð í fjør var fyrrverandi formaður Sambandsfloksins, Edmund Joensen, frammi við eini grein, har hann eftirlýsti milliardirnar í Landsbankanum. Í hesi grein varð m.a. komið inn á rikisleiðarar í øðrum londum, sum hava stungið milliardir av vegnum.

Alfred Olsen nevnir í síni grein, at landskassans innistandandi í Landsbankanum er minkað við 400 mió. krónur, og meðan tað ikki er vert at gera viðmerkingar til tað, sum Edmund Joensen bar fram, so er til viðmerkingina hjá Alfredi at siga, at tað ber ikki til at samanbera tøl fyri januar mánaða við tøl fyri juli sama ár, tí tað er sum nevnt ymiskt, hvussu útreiðslur og inntøkur falla í einum ári.

Skal ein samanbering gerast við juli í ár, so má hon gerast við juli í fjør. Landskassans innistandandi í Landsbankanum í juli í fjør var 1.866 mió. krónur, meðan innistandandi í juli í ár er 2.048 mió. krónur. Her er sostatt ein hækking uppá knappar 200 mió. krónur.

Innistandandi landskassans í Landsbankanum 1. januar í ár var 2.458 mió. krónur, og mett verður, at talið verður á leið tað sama 1. januar komandi. Hetta er eftir, at avdráttur er goldin uppá landskassans skuld fyri 2002.

At enda skal verða sagt, at tað hesi seinastu 4 árini er goldið niður uppá landskassans skuld við umleið 800 millónum krónum.

Tak til jer alle

Som regel skriver man et læserbrev for at deltage i en debat – fordi man er utilfreds over et eller andet eller måske har et andet synspunkt om det, der er „in" for tiden.

Vi har lyst til at skrive et læserbrev, fordi vi nu efter mere end seks dejlige år forlader Færøerne.

Da vi kom til Færøerne i 1996 var det med stor forventning om at skulle bo og leve heroppe i de næste 2 til 3 år.

Hurtigt kom vi til at holde af dette smukke lille land og dets venlige og imødekommende befolkning. Vi blev modtaget med smil og hjertelighed og vi havde ikki boet her ret længe før vi søgte om forlængelse, så vi kunne være her til vor pensionering. Vi fik forlængelsen, og det har vi aldrig fortrudt.

Vi føler en stor glæde, taknemmelighed og ydmyghed efter at have haft mulighed for at leve her og blive accepteret, som en del af jer i alle disse år.

Vi har med stor stolthed vist utallige familiemedlemmer, gode venner og officielle gæster rundt på øerne og vi kan rejse herfra med mindet om et land, vi virkelig kender.

Tak til jer alle for jeres gæstfrihed – tak for dejlige oplevelser – tak fordi I er, som I er.

Held og lykke med jer og Færøernes fremtid.

Ingelise og Jesper Dinesen
Gammel adresse: Yviri við Strond 14
Fremover; Mors

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari: Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

10. flokkur á Eysturskúlanum

Eilif Samuelsen

Tað var ikki sørt órógvandi at hoyra tíðindi í fjølmiðlunum, at Eysturskúlin hevði býtt næmingarnar í ein 10. flokk eftir, hvussu væl teir dugdu í einari einstakari lærugrein, nevniliga støddfrøði.

Órógvandi var tað fyri okkum, sum minnast, hvussu tað var at liva undir eini skúlaskipan, har tú sum lærari skuldi undir ta ótýdligu uppgávuna at skilja børnini sundur í tveir bólkar: ein bókligan og so hini, sum ikki skuldu verða egnað til bókligan lestur! Fyrst var sundurbýtið, hvør av teimum 10 ára gomlu, ið slapp í millumskúlan ella ikki. Síðani hvør ið slapp í realskúlan 3 ár seinni. Var tað ein ótýdlig uppgáva hjá lærarunum, hvussu mundu so ikki børnini og tey heima kenna tað, tá ið tey fingu dómin at hoyra?

Við skúlalógini frá 1962 vórðu tey fyrstu veruligu stigini tikin til at linka eitt sindur viðvíkjandi sundurbýtingini. Teir fyrstu 8. og 9. flokkarnir vórðu settir á stovn, sum eitt veruligt alternativ til realskúlan, aftaná at 7 ára undirvísingarskyldan var av, men mannagongdin við sundurbýtingini gjørdi framvegis mannamun, og lærararnir vóru tilvitaðir um, at býtið hevði sera lítið við rættvísi at gera.

Við fólkaskúlalógini frá 1979 eydnaðist endiliga at gjøgnumføra eindarskúlan. Ein valskúla við samanhildnum flokkum frá 1. og til 9. ella 10 flokk. Næmingarnir, sum koma í 1. flokk skulu í prinsippinum fylgjast í flokki heilt upp til 10. flokk.

Í fólkaskúlalógini frá 1997 eru tær seinastu leivdirnar frá sundurbýting (niveaubýti) ruddaðar út, og undirvísingarskyldan er víðkað úr 7 árum í 9 ár.

Í hesi lóg stendur í § 30, stk.2: Skúlarnir verða býttir í flokkar eftir næmingatalinum..... Í stk 3 stendur: Tá ið børnini á fyrsta sinni verða býtt sundur í flokkar, eigur dentur at verða lagdur á, at tann einstaki flokkurin verður varðveittur, allur sum hann er, tey komandi skúlaárini. Vanliga kann nýtt floksbýti ikki gerast vegna val av lærugreinum eftir § 12, stk. 3.

Tað er ikki tilvildarligt, at hetta er sett inn. Henda ásetingin skal tryggja, at vendast skal ikki aftur til gomlu næmingasundurbýtingina. Flokkarnir skulu skipast eftir tí mest neutrala kriteriinum, nevniliga næmingatalinum. Her verður eisini undirstrikað, at tann einstaki flokkurin verður varðveittur, allur sum hann er, og at nýtt floksbýti kann vanliga ikki gerast vegna val av lærugreinum (men kanska orsakað av at t.d. 3 flokkar verða lagdir saman til 2 vegna lágt næmingatal).

Tann gamla næmingadifferentieringin var ómenniskjanslig, órættvís og ópedagogisk, og tað er einki, sum talar fyri, at føroyski fólkaskúlin eigur at venda aftur til nakað, sum ber brá av hesi avoldaðu skipan.

Tað er ein royndur lutur, at spjaðingin í flokkunum kann vera rættiliga stór.Tað eru næmingar, sum hava lætt við at læra og tí loysa uppgávurnar skjótt, og tað eru næmingar, sum brúka longri tí til tað sama. Í staðin fyri at differentiera næmingarnar eigur skúlin framhaldandi at menna undirvísingardifferentieringina, t.v.s at geva teimum kviku næmingunum uppgávur, sum hóska til teirra stig og teimum tyngru tað, sum hóskar til teirra.

Framvegis er stórur tørvur á at menna undirvísingartilfarið og undirvísingarumstøðurnar í skúlunum. Framhaldandi eftirútbúgving av lærarunum er ein fyritreyt fyri, at næmingarnir skulu kenna skúlatíðina sum ein meiningsfulla tíð. Næmingarnir í framhaldsdeildini og serliga teir í 10. flokki hava nógv alternativ, sum kappast við fólkaskúlan. Tí ræður um at gera nakað serstakt fyri teir, og tað leggur nýggja fólkaskúlalógin í ríkiligt mát upp til.

Tað einasta, hon ikki leggur upp til, er at fara aftur til tann ómenniskjansliga sundurbýtingarmátan, har lærarar skulu dygdarflokka næmingar eftir sera ivingarsomum metingarstøði.

Fremja føroyska virðisbrævamentan

Kristina Háfoss,
Løgtingskvinna
Tjóðveldisfloksins

Í samband við, at føroyski virðisbrævamarknaðurin skjótt verður til reiðar, hevði eg fyri stuttum viðmerking í bleðunum við heitinum: "Føroyski" virðisbrævamarknaðurin verður íslendskur. Endamálið við hesi viðmerking varð, at fáa í lag eitt kjak og upplýsing um komandi ætlanirnar, og var tað tí gleðiligt, at nevndin fyri virðisbrævamarknað Føroya (VMF) mikudagin kom við sera góðari og upplýsandi grein í Sosialinum. Hetta vórðu upplýsingar, ið nógv óivað hava fingið gleði av.

Eg varð tó kunnug við hesar upplýsingar og vórðu tær ikki í andsøgn við, og brøyta heldur ikki niðurstøðurnar í, undanfarnu grein míni.

Føroysk/íslendska loysnin

Sum nevndin fyri VMF eisini vísir á, verður talan um ein føroyskan virðisbrævamarknað, har virðisbrævamiðstøðin og "clearing'in" kemur at liggja í Danmark (eins og hon hevði gjørt við eini føroyskari loysn), meðan handilsstaðurin kemur at liggja í Íslandi, har føroysku virðisbrøvini verða skrásett.

Tað er tí eftir mínum tykki ivasamt, hvussu føroyskur hesin virðisbrævamarknaður verður, hóast tað verða føroyskir peningastovnar og aðrir meklarar, ið fara at fremja handlar v.m. vegna føroysku viðskiftafólkini. Hetta er ein møguleiki, ið føroysk viðskiftafólk somuleiðis hava í dag, men nýta lítið.

Handilslig atlit

Eg eri samd í, at tá talan verður um virðisbrævamarknað, eru tað fyrst og fremst handilsligu atlitini, ið hava áhuga og við hesum í huga, kann tað fyri so vítt verða líka mikið hvørt ein virðisbrævamarknaður liggur í USA, Íslandi ella Føroyum. Men fyri mítt viðkomandi hevur tað tó eisini týdning, at vit menna ein førleika á virðisbrævaøkinum – ikki bert við samskipan og mekling, men eisini við at menna egnan handilsstað, serstakliga við atliti til, at heitið Virðisbrævamarknaður Føroya verður nýtt.

Føroyskan marknað

Nevndin í VMF vísir á, at tað er ov kostnaðarmikið at seta á stovn føroyskan marknað, men viðvíkjandi figgjarligum krøvum til eginpening, so eru krøvini um 8 mió. í eginpeningi fyri lóggildaðan marknað ikki nógv. Serstakliga, tá hugsað verður um, at tey, ið standa aftan fyri partafelagið, ið skal seta á stovn marknaðin, eru stórur partur av størstu fyritøkum, feløgum og stovnum landsins. Verður valt at seta á stovn 'fondsbørs' er kravið 40 mió. og er hetta sjálvsagt munandi størri krav. Viðvíkjandi telduskipanum v.m. eigur ikki at verða neyðugt at menna tílíkt av nýggjum. Tílíkar handilsskipanir kunnu keypast og tillagast.

Kunning og samskipan avgerandi

Tað skal als ikki verða nakar ivi um, at eg taki fult undir við, at farið verður undir at skapa betri umstøður fyri føroyskum virðisbrævahandli og fer komandi virðisbrævamarknaðurin at bøta um hetta.

Føroyskar fyritøkur og íleggjarar hava í dag møguleika fyri at nýta útlendskar virðisbrævamarknaðir, men verður hetta gjørt í avmarkaðan mun. Stóra uppgávan frameftir liggur tí í, at fremja kunning og samskipan á virðisbrævaøkinum soleiðis, at føroyskar fyritøkur og íleggjarar kunnu verða hvørjum øðrum at gagni. Í hesum sambandi fer Virðisbrævamarknaður Føroya vónandi at fáa stóran týdning og fer harvið vónandi, at fremja eina føroyska virðisbrævamentan.

Virðisbrævamarknaður og íløgur

Heðin Zachariasen,
løgtingsmaður fyri
fólkaflokkin

Seinastu tíðina hevur stovnsetan av einum føroyskum virðisbrævamarknaði verið umrott. Politikarar, búskaparfrøðingar, bankafólk og onnur eru komin við teirra hugsan um hetta, fyri okkum føroyingar, nýggja og rættiliga ókenda fyribrygdi.

Men hvat er ein virðisbrævamarknaður og hvat týdning hevur ein virðisbrævamarknaður. Hví er tað so umráðandi við einum føroyskum virðisbrævamarknaði og fer ein føroyskur virðisbrævamarknaður at vera til gagns fyri føroyingar og føroyska samfelagið?

Eitt av endamálunum við einum virðisbrævamarknaði er at fyritøkurnar, sum verða skrásettar á marknaðinum harvið fáa tilført størri eginpening, og tað er gott fyri fyritøkuna og búskapin sum heild. Á einum virðisbrævamarknaði hava øll sama møguleika at bjóða uppá partabrøvini. Hetta fer somuleiðis at føra við sær, at eigaraviðurskiftini í føroyska vinnulívinum verða munandi broytt.

Eitt, sum eydkennir føroyska búskapin eru allar tær smáu fyritøkurnar, bæði á sjógvi og landi, sum eru rættiliga fleksiblar og tískil skjótar at umstilla seg eftir útboði og eftirspurningi. Tær flestu av hesum fyritøkum koma helst ongantíð at vera skrásettar á einum virðisbrævamarknaði.

Og hvør fer at keypa partabrøv á einum føroyskum virðisbrævamarknaði? Einstaklingar? Føroyingar? Útlendingar? Fyritøkur? Pensiónsgrunnar? Íløgufeløg?

Eitt av endamálunum við virðisbrævamarknaðinum er, at váðin og harvið vinningurin, verður meiri spjaddur, so at føroyski búskapurin gerst stabilari. Tí er sera umráðandi, at føroyingar gera íløgur í bæði føroyskar og útlendskar fyritøkur og at vit eggja útlendingum til at gera íløgur í Føroyum, soleiðis at útlendskur kapitalur verður við til at fíggja føroyska vinnulívið.

Eitt skulu vit gera okkum greitt, at tá vit seta pening í partabrøv, er vandin mundandi størri at missa peningin, enn tá vit seta pening í bankan. Eg hugsi um støðuna í 90´unum, tá ið nógvar føroyskar fyritøkur fóru á húsagang og eigararnir mistu allan partapeningin. Vanligi føroyingurin, sum hevði spart nakað av pengum saman í bankanum, misti tó ikki alt. Hevði øll uppsparingin verið sett í føroysk partabrøv, sótu nógv eftir við ongum. Hvussu hevði støðan verið tá? Høvdu vit havt reist okkum so skjótt aftur, um hvørt oyra var sett í partabrøv við vón um størri avkast, heldur enn at ein partur hóast alt stóð tøkur í bankunum? Ein av orsøkunum til, at gongd kom á aftur vinnulívið var, at hesi fólk høvdu møguleikan og viljan til at brúka teirra uppsparing til at seta nýggja vinnu í gongd. Vit skulu eisini minnast til, at ein partur av hesum virkjum vóru sett á stovn í tøttum samstarvi við útlendingar og útlendskar fyritøkur, sum vóru sinnað at seta pening í føroyska vinnulívið.

Ein annar spurningur er, um føroyingar framvegis fara at hava líka stóran hug til at seta nýggjar og spennandi ætlanir í verk, um tey uttan hóvasták og kanska við minni váða, kunna seta sparipeningin í verandi fyritøkur bert við egnum vinningi fyri eyga.

Framhald á síðu 14